

# Magni Christiansen

Eitt tað størsta navnið innan kristiligan tónleik tey seinastu árini er Magni Christiansen. Við sínum kontritulkingum av gomlum kristiligum løgum, so sum sunnudagsskúlasangum, hevur Magni tryggjað sær fleiri fast pláss í Kvøðuljómunum. Magni hevur eisini frá fyrstu framførslunum saman við Róin, verið kendur sum ein av okkara mest undirhaldandi showmonnum. Men á seinastu útgávuni hjá Magna flutti hann seg í eina heilt aðra deild. Magni Christiansen, ið nú er búsitandi í Kvívík er upprunaliga vestmenningur, og á hesi fløguni traðkar hann á teirri leið, ið bólkar sum eitt nú Vestmenn hava traðka áðrenn hann, leiðina móti kontri av høgum klassa. Fløgan er ein sonn góðskufløga við kontri tónleiki. Magni er sostatt við til at staðfesta støðuna hjá Vestmanna sum Føroya kontri høvuðsstaði, og mest sum fyri at geva hesi staðfesting eyka vekt, hevur Magni spælt inn fløguna í heimsins kontri høvuðsstaði Nashville saman við nøkrum av heimsins bestu kontritóleikarum.

**nud**

# Direct Level

Direct Level hevur okkurt! Okkurt, sum ger, at tú skilur, at her er ikki bert talan um ein annan lovandi kristiligan rokkbólk. Men kanska heldur um ein sera lovandi rokkbólk. Síðan bólkurin sá dagsins ljós í 2003, hava teir støðugt ment sínar gávir sum sangskrivarar. Gávur í greitt komu til sjóndar á demofløguni, ið bólkurin lat úr hondum í fyrra árið. Bólkurin hevur við luttøku í Prix Føroyum, Gospel Prixnum og á G! spælt seg beint inn í hjørtuni á nógvum áhoyrarum. Umframt eyðsýndu evnini at skriva vælklingandi gittarrokk við atmosferiskum dámi, so hevur bólkurin í sangaranum Dan Leivssyni ein frálíkan sangara. Røddin hóskar væl til tónleikin, og er við til at geva vøkru melodiiunum tann rætta kantin, stutt sagt ber røddin løgini.

**nud**




## Skal rúturin skiftast?

**Tú ringir, vit máta upp, framleiða og seta rútin í**

Termorútar, maskinrútar bátarútar, hyllar, glasveggir og -hurðar, plexiglas, spegl, innramming, bil- og handilsrútar o.a.




Vit ynskja øllum ein góðan
**FJARÐAFESTIVAL**

**Atlanticpane**
Ósabakkavegur · 410 Kollafjørður · tlf 42 14 05